## Maratonlegenda komin til Føroya

Ein stór legenda innan olympiska og altjóða renning er komin til Føroya. Talan er um Ron Hill, sum tók lut á olympisku summarleikunum í Tokyo í 1964, Mexico býi í 1968, og í Munchen í 1972. Ron Hill setti heimsmet í heilum maraton í 1970, tá hann, sum annar persónurin í heimssøguni rann fult maraton undir 2 tímar og 10 minuttir. Ron Hill varð fyrsti bretin, sum rann maratonteinin undir 2 tímar og 10 minuttir. 69 ára gamla rennilegendan hevur runnið hvønn dag í skjótt 44 ár. Hetta hevur hann gjørt líka síðani 21. desember í 1964. Nú er hann so komin til Føroya, og gevur rennilegendan okkum tann stóra heiður og æru, at vit gerast land nr. 100, sum hann rennur 1/2 maraton í.



## Anton gevst hjá Víkingi

Víkingur fer nú at leita eftir nýggjum venjara, tí Anton Skoradal, sum hevur vant formulaliðið hjá Víkingi, gevst sum venjari. Heimasíðan hjá Víkingi skrivar, at venjaraspurningurin hjá Víkingi til komandi kappingarár nú hevur verið til viðgerðar. - Víkingur og okkara núverandi formulavenjari, Anton Skoradal, eru samd um, at Anton Skoradal gevst sum venjari tá hetta kappingarári er av, skrivar heimasíðan. Anton Skoradal ætlar ikki at starvast innan fótbóltsheimin fyribils, og sostatt fer Víkingur út at finna nýggjan venjara til komandi kappingarár.

# Renningin setir met

**Áhugin at taka lut í fólkaheilsurenningini er ovurstórur, og bæði í Havn og í Klaksvík verður roknað við metstórari luttøku**

RENNING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í tíðindaskrivissiga fyrireikarararnir fegnast um, at longu hósmorgunin høvdu 500 fólk í øllum aldri meldað seg til renningarnar. Veðurfrøðingar boða eisini frá allar fagrasta veðrið í Klaksvík og í Havn um vikuskiftið, so óiva leggjast heilt nógv fólk aftrat.

Í Klaksvík ber eisini til at melda seg til klokkan 13, tá startnummar og endurskinsvestar eisini verða útflýggjað, og klokkan 13.50 – 10 minuttir undan renningni – er felags upphiting á skránni.

Í Havn verður byrjað ein tíma fyrr. Klokkan 12 verða startnummur og vestar útflýggjað, og tá ber enn til at tekna seg. Upphitingin verður við SMS klokkan 12.50, og klokkan 13 verða fyrstu fetini á rutunum so tikin.

### Ruturnar

Í Klaksvík verður byrjað og endað við Badmintonhøllina. Øll renna oman eftir Bøgøtu, aftanfyri Skýlið og úteftir. Tey sum renna styttra teinin venda á Gravarbø, meðan tey sum renna longra teinin venda úti á Skarðhamri. Á veg heimaftur verður snarað oman eftir Mækjuvegnum, síðani niðan til Bøgøtu og oman aftur til Badmintonhøllina.

Í Havn er startur og mál við SMS. Leiðin gongur oman gjøgnum miðbýin, framvið Kongabrúnni og út móti Skansanum. Við rundkoyringina við Skansan fara tey, ið ætla sær styttra teinin, til vinstru niðan eftir Jonas Broncks gøtu og R.C. Effersøes gøtu til SMS. Tey, ið ætla sær longra teinin venda til høgru við rundkoyringina og fara eftir Ringvegnum niðan framvið Norðurlandahúsið, oman Áargeil, framvið Badmintonhøllina, síðan út á R.C. Effersøes gøtu og oman í SMS.

Bæði í Havn og Klaksvík er syrgt fyri, at rutan er væl merkt allan vegin.



*Góða veðrið og ein økt tilvitan um heilsu tykjast virka fyri, at luttøkan til heilsurenningina setir met í ár*

*Savnsmynd*

**1. deild**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AB | 20 | 16 | - | 1 | - | 3 | 71 | 21 | 50 | 49 |
| 2 07 Vestur | 20 | 15 | - | 2 | - | 3 | 84 | 27 | 57 | 47 |
| 3 VB/S | 20 | 15 | - | 2 | - | 3 | 46 | 17 | 29 | 47 |
| 4 TB | 20 | 11 | - | 3 | - | 6 | 50 | 18 | 32 | 36 |
| 5 Víkingur | 20 | 8 | - | 3 | - | 9 | 27 | 46 | -19 | 27 |
| 6 NSÍ | 20 | 5 | - | 5 | - | 10 | 38 | 50 | -12 | 20 |
| 7 HB | 19 | 4 | - | 6 | - | 9 | 22 | 36 | -14 | 18 |
| 8 B68 | 20 | 4 | - | 3 | - | 13 | 30 | 53 | -23 | 15 |
| 9 KÍ | 19 | 4 | - | 2 | - | 13 | 22 | 62 | -40 | 14 |
| 10 EB/S | 20 | 3 | - | 1 | - | 16 | 15 | 75 | -60 | 10 |

## Dystaryvirlit

**1. deild**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 06.09 | 07 Vestur-AB | Andrew Christiansen |
| 06.09 | Víkingur-B68 | Jón Kári í Brekkuni |
| 06.09 | VB/S-KÍ | Eiler Rasmussen |
| 06.09 | NSÍ-HB | Jan Skoradal |
| 07.09 | TB-EB/S | Birgir Sondum |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 07.09 | AB-ÍF | Pætur Albinus |
| 07.09 | B36-Víkingur | Rói Jacobsen |
| 07.09 | MB-Skála | 07 Vestur |
| 07.09 | TB-KÍ P | áll Augustinussen |
| 07.09 | 07 Vestur-Fram | MB |

**Kvinnur**

| | |
|---|---|
| 07.09 | KÍ-Víkingur |
| 07.09 | Skála-AB |
| 07.09 | VB/S-B36 TB |

# Toppuppgerð í 1. deild

**VB/Sumba er til reiðar at taka av, tá AB ella 07 Vestur missa dýrabær stig í morgin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Leygardagin verður dystur á Argjum, har AB tekur ímóti 07 Vestur. Í løtuni eru tað hesi bæði liðini, ið liggja á báðum uppflytingarsessinum, men beint aftan fyri er VB/Sumba, sum uttan iva vil gera sær dælt, nú annað – ella kanska bæði – av oddaliðunum missir stig.

VB/Sumba spælir um sama mundið á heimavølli móti KÍ, og her er heimaliðið at rokna sum greiður favorittur.

Og tað tykist lítil ivi vera um, at uppflytararnir skulu finnast millum tey trý liðini. TB var væl við fyrsta partin av landskappingini, men teir eru spakuliga dragnaðir, og í løtuni røkist lítið fyri, at teir vinna seg burtur av fjórða plássinum á stigatalvuni.

Í botninum er spenningurin eisini stórur. Her stendur slagið fyrst og fremst millum B68, KÍ og EB/Streym, og øll trý hava tey truplar dystir á útivølli hetta vikuskiftið.